# P/f TJALDUR

## (fyrr p/f Skipafelagið Føroyar)

### Útgjalding av vinningsbýti

Á aðalfundi 30. mai 2005 varð samtykt at gjalda vinningsbýti til partaeigararnar. Vinningsbýtið er 100% av partapeninginum, t.e. kr. 5.050.000.

Fyri at tað skal verða møguligt at gjalda út, er neyðugt, at hvør einstakur partaeigari letur okkum hesar upplýsingar skrivliga:

**Navn á eigara, P-tal og kontonummar**
**í peningastovni (evt. tlf. nr)**
**Litra og nr. á partabrævi**

Tey flestu partabrøvini eru frá 1920'unum, og sambært viðtøkur felagsins skulu eigaraskiftir vera váttað av nevndini.

Á aðalfundi 30. mai 2005 vórðu viðtøkurnar broyttar soleiðis, at partabrøvini hereftir frítt kunnu verða seld. Men framhaldandi skal sigast frá, tá partabrøv skifta eigara, so at vit kunnu dagføra partaeigaraskránna so hvørt.

Einans tey, sum eru skrásett sum eigarar, kunnu fáa útgoldið vinningsbýti og luttaka á aðalfundi.

Felagið, sum áður æt p/f Skipafelagið Føroyar, broytti í 2004 navnið til p/f Tjaldur.

Gerið so væl at skriva til:

**P/f TJALDUR**
teldupostadressa: STATUS@POST.OLIVANT.FO
Postrúm 250
700 Klakksvík

# Starv í Føroya Skúlabókagrunni

Eitt starv í Føroya Skúlabókagrunni verður lýst til setanar sum skjótast og ikki seinni enn 1. august 2005.

Starvið fevnir í høvuðsheitum um praktiskt útgávuvirksemi, ráðgeving og vegleiðing í sambandi við at geva út fjølbroyttar undirvísingarmiðlar til føroyska skúlaverkið. Ein partur av starvinum verður at kunna seg við tørv á tíðarbærum undirvísingarmiðlum, lærigreinum og undirvísingarevnum, eina helst í fólkaskúlanum, eisini í teld og teldutøkum útgávum. Upplæring kann verða neyðug.

Til starvið krevst útbúgving sum fólkaskúlalærari, í minsta lagi 5 ára undirvísingarroyndir, dyggur fakligur førleiki, hollur kunnleiki í føroyskum og kunnleiki í teld.

Løn og setanartreytir verða eftir sáttmála við Føroya Lærarafelag og við góðkenning Fíggjarmálaráðsins. Royndartíðin er eitt ár.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera skúlabókanevndini í hendi ikki seinni enn mánadag 4. juli 2005. Gjølligari upplýsingar um starvið fáast frá Helenu Dam á Neystabø, telefon 31 61 00.

Tórshavn 16. juni 2005

**Føroya Skúlabókagrunnur**
Skúlabókanevndin
Lützenstrøð 4
FO-10 Tórshavn

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

# Lærari til El-deildina

Starvið, sum er eitt fulltíðarstarv, umfatar undirvísing á El-deildini.

Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum elektrikari, hava prógv sum el-installatørur og viðkomandi starvsroyndir innan yrkið. Umsøkjarar við undirvísingarroyndum hava fyrimun. Neyðugt er, at umsøkjarin hevur hollan kunnleika til nýggjastu tøknina á el-økinum. Eisini er áhugi fyri støðd-, alis- og evnafrøði, og nýtslu av EDV, ein fyrimunur.

**Setanarkor til fast starv:**
Fyrstu 2 árini verða roknað sum royndartíð, har tann, sum verður settur í fast starv, má vera til reiðar at taka ta eftirútbúgving, tað verður seg pedagogiska/-undirvísingarliga ella aðra førleikagevandi útbúgving, sum er neyðug fyri at verða settur í fast starv.

**Løn:**
Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Landstýri og FTL.

Starvið skal setast 8. august 2005.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndir og viðmælum skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 27. juni 2005.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlan.

**Tekniski skúlin í Tórshavn**
Marknagilsvegur 75 • P.o.b. 239 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 308050 • Fax +298 308051
E-mail: tst@tst.fo


FA. GRAVSTEINAR




*Opið: mánadag - fríggjadag 9⁰⁰-17⁰⁰*
*annars sambært avtalu.*

*Nýggj vøruskrá fæst!*

Sjónband - 31 77 74


# Sumbiar skúli

Vegna farlyvi verður søkt eftir lærara til tíðaravmarkað starv skúláárið 2005/2006.

Starvið er umleið 10 tímar um vikuna.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokki 18.1 - 27.1.

Meira fæst at vita um starvið hjá fyrstalæraranum á tlf. 370666 ella tlf. 373875.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 12. juli.

**Skúlastýri fyri Sumbiar skúla**
v/Eyðvør Müller, tlf. 370077
970 Sumba

## Sterkstreymsverkfrøðingur

Landsbyggifelagið pf. søkir eftir sterkstreymsverkfrøðingi til projekterings- og fakeftirlitsarbeiðið.

**Arbeiðið umfatar sterkstreyms- og veikstreymsinnleggingar og stýringar í samband við:**
- Bygningar, so sum skúlar, stovnar, skrivstovubygningar, framleiðslu- og goymslubygningar v.m.
- Anleggsarbeiðir, so sum vegir, vegtunnlar og havnir.

**Førleiki:** Vit søkja eftir einum verkfrøðingi við kunnleika til projektering og/ella eftirlitsarbeiðið innanfyri tey omanfyri nevndu økini. Kunnleiki til tekni-skipanina AutoCad er ein fyrimunur.

Vit bjóða eitt spennandi arbeiði við góðum møguleikum fyri fakligari menning og vænta afturfyri holla fakliga vitan, góð samstarvsevnir, ágrýtni og tilvitan um góðsku.

**Nærri fæst at vita við at venda sær til:**
Finn Müller, finn@lbf.fo, ella Hanus Hansen, hanus@lbf.fo, telefon nr. 00298 314744.

LBF LANDSBYGGIFELAGIÐ P/F
RÁÐGEVANDI VERKFRØÐINGAR
Landsbyggifelagið P/F · Postboks 228
Grønlandsvegur 5 · 110 Tórshavn

Sosialurin 341800


## Arbeiðshandskar
*til øll endamál - bæði á sjógvi og landi*

Beinleiðis frá framleiðara

**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo

Sosialurin 311820

# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480

-so eru tit við!